# Øll duga okkurt uttan fyri skúlan

**Føroya Handilsskúli á Kambsdali hevði opið hús fyri almenninginum mikukvøldið. Eitt avbera væleydnað tiltak, sum fyrst og fremst hevur til endamáls at finna evni hjá næmingum til at skapa nakað uttan fyri skúlagongdina**



aaSkúlastovurnar á handilsskúlanum á Kambsdali virkaðu sum sokallaðir kunningarbasar mikukvøldið. Páll Isholm, skúlastjóri letur væl at tiltakinum

*Mynd: Johnard Hammer*

TILTAK
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Samantvinnaða tiltakið við kunning og hugnakvøldi á Handilsskúlanum á Kambsdali er eitt tiltak, sum hevur ment seg á hvørjum ári, síðani tey byrjaðu fyri trimum árum síðani.

– Endamálið er fyrst og fremst at finna onnur evni hjá næmingunum uttan fyri skúlagongdina, sigur Katrin Zachariasen, inspektørur.

Hon fekk hugskotið til hetta tiltak fyri trimum árum síðani, tá hon var flokslærari. Tá varð tiltakið hildið bara fyri starvsfólkum, lærarum og næmingum á skúlanum. Annað árið bjóðaðu tey tíggjunda flokkum við fyri at hesi kundu fáa eina mynd av, hvussu handilsskúlin virkar, og í ár gjørdu tey so av at hava opið hús alment.

– Eg ivist ikki í, at øll vita, at vit eru her, men hetta er ein góður máti at varpa ljós á skúlan og geva fólki innlit í okkara gerandisdag, samstundis sum tey fáa eitt hugnaligt kvøld, sigur Katrin.

Hon sigur, at tað er stuttligt at síggja, hvussu nógv næmingarnir gera fyri eitt tílíkt kvøld, skal eydnast til fulnar.

– Her fáa vit eyguni upp fyri øðrum evnum, sum næmingarnir hava, men sum ikki koma til sjóndar í dagligu undirvísingini, sigur hon.

Hon vísir á, at øll duga eitt ella annað uttanfyri skúlan, og tað royna tey so at finna.

### Mótaframsýning og kunning

Kvøldið byrjaði klokkan seks við kunning um skúlan og virksemið. Umsóknarfreistin til at søkja inn á skúlan er úti um 10 dagar, so hetta var eitt gott høvi til at kunna.

Kunningin gekk fyri seg á tann hátt, at skúlastovur vórðu gjørdar um til eitt slag av kunningarbásum, har fólk so kundu síggja tilfar um skúlan. Og tað var ikki so lítið av tilfari, tá samanumkom.

Páll Isholm, skúlastjóri, sigur, at hann heldur hetta vera eitt frálíkt hugskot, tí at á einari síðu fæst eyga á eina øðrvísi síðu av skúlanum, meðan tann dagliga eisini kemur fram.

Tá kunningin var av, har greitt var frá høvuðsuppgávuni og marknaðarføring, byrjaði sjálvt hugnakvøldið við skemti, mótaframsýning og øðrum undirhaldi.

Einir níggju handlar í Eysturoynni og úr Klaksvík luttóku á mótaframsýningini, og næmingarnir gingu sjálvi. Ein genta úr FHS gekk eisini í klæðum, sum hon sjálv hevði sniðgivið og seymað. Og tað var nakað, sum hugtók øll.

Mótaframsýningin varð skipað á tann hátt, at hon gekk aftur allatíðina, og so vóru aðrar framførslur ímillum. Hetta gav teimum, ið gingu, betri stundir at skifta klæðir.

Av øðrum framførslum hetta kvøldið kunnu nevnast tónleikur og sangur, framløga frá einum bólki, sum hevur arbeitt við einum ávísum evni og ljósmyndir, sum vórðu vístar um skúlan.

### Afturvendandi

Hetta var sum sagt fyrstu ferð, at skúlin hevði opið hús fyri almenninginum, og vistu tey tí ikki, hvat tey skuldu vænta frammanundan. Men heilt fitt av fólki komu á gátt, og tað fegnast tey um.

– Hetta gera vit aftur næsta ár, tað er púra vist, sigur Katrin Zachariasen, inspektørur á Føroya Handilsskúla á Kambsdali.



*Sissal Kristiansen greiddu frá um marknaðarføring*

*Mynd: Johnard Hammer*



*Næmingarnir fáa við hesum tiltakinum høvi til at vísa evni sum tey hava uttanfyri vanligu skúlagongdina.*

*Mynd: Johnard Hammer*



*Mótaframsýning var millum undirhaldið hetta kvøldið*

*Mynd: Johnard Hammer*

## Norðoyastevna mennast

**Klaksvík:**
Nevndin í Norðoya frítíðar og ítróttarráð heldur ikki, at norðoyastevna er nóg áhugaverd, sum er, og tí hevur nevndin gjørt av, at fundurin um stevnuna skal verða nógv fyrr í ár.

Símin Michael Sørensen, ein av limunum í Norðoya frítíðar og ítróttaráð sigur við Norðlýsið, at í mong ár hevur verið tosað um at lyfta Norðoyastevnuna upp á eitt hægri og meira áhugavert støði.

– Vit fara at ganga undan, at broyta Norðoyastevnuna og tí fara vit longu hóskvøldið í komandi viku at hava fund við øll feløg, sum vanliga myndað norðoyastevnu. Hetta fyri at geva feløgunum longri skoðbrá at fyrireika tiltøk, sigur hann við Norðlýsið.

Fundurin verður í býráðshøllini kl. 19 hóskvøldið. Norðoyastevna í ár er sett til at verða vikuskiftið 4., 5. og 6. juni.

-sae-



# Tjóðveldisflokkurin brynjar seg til andstøðupolitikk

**Eftir seks ár í samgongu hevur størsti flokkur á tingi fyrireika seg til nýggja leiklutin sum andstøðuflokkur komandi valskeið, og í hesum sambandi varð boðið til tíðindafundar hósmorgunin á Gamla Apotekið. Tjóðveldislokkurin hevur sett nýggj framsøgufólk og lagt 15 uppskot á ting komandi tingsetuna**



*– Vit fara at leggja stóran dent á sjálvir at koma við uppskotum og reka ein virknan andstøðupolitikk, sigur Høgni Hoydal*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

TJÓÐVELDISFUNDUR
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Formaður Tjóðveldisfloksins, Høgni Hoydal, vónar, at politikkurin í komandi andstøðu ikki fer at drukna í andstøðu mótvegis samgongu, men at talan heldur verður um ein initiativríkan andstøðupolitikk við støðugum íkasti til samgonguarbeiðið.

Við hesum vónum hevur Tjóðveldisflokkurin brynja seg til eitt nýtt politiskt kapitul í andstøðu við nýggjum bygnaði og 15 løgtingsuppskotum hesa tingsetuna. Omanfyri er listi prentaður við nýggju framsøgufólkum Tjóðveldisfloksins á ymsu økjunum umframt løgtingsuppskot Tjóðveldisfloksins.

### Barsilsskipan fyri lesandi

Úr rúgvuni av uppskotunum kann nevnast, at barsilsskipan fyri lesandi ikki hevur verið frammi fyrr og verður tískil áhugaverd at fylgja í løgtingsviðgerð. Í hesum uppskoti er ynski um eitt ára eyka útbúgvingarstuðul til møður undir útbúgving, meðan ein lesandi faðir kann fáa seks mánaða eyka útbúgvingarstuðul. Móðirin hevur tó møguleikan at geva nakað av síni tíð til faðirin, og er talan í roynd og veru um eitt sera umfatandi uppskot, sum Tjóðveldisflokkurin vónar fær góða móttøku í samgonguni.

Uppskot til løgingslóg um barnaverndarlógina er sjálvsagt eitt sera umfatandi og stórt øki, og er talan um sama uppskot, sum hevur verið frammi fyrr, tó við nøkrum tillagingum.

– Á hesum øki hava vit framvegis tann hugburð, at skulu kommunurnar valda, skulu tær eisini gjalda, segði framsøgumaður Tjóðveldisfloksins á hesum øki, Páll á Reynatúgvu.

### Betri umstøður til tónleikarar

Torbjørn Jacobsen hevði undir fundinum eisini áhugavert upplegg um menning av tónleikaumstøðunum í Føroyum. Í valdømi hansara er ikki eitt einasta spælistað til lokalu tónleikararnar, og hóast viðurskiftini í miðstaðarøkinum eru á einari leið, eru umstøðurnar sambært honum út av lagi í útjaðaranum. Sum liður í økismenningarpolitikki floksins er tískil ætlanin at gera íløgur í tónleika- og mentanarlívið.

– Vit síggja, hvørji úrslit tjóð okkara hevur fingið við íløgum í ítróttin, og við einum styrktum grundarlagið kann tað sama saktans henda á tónlistarliga økinum, raðfesta vit rætt, segði Torbjørn Jacobsen á fundi hósmorgunin.

Við at hyggja at listanum við løgtingsuppskotum sæst, at stórar og kostnaðarmiklar verkætlanir eru í hyggju á útbúgvingarøkinum við Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna, Tekniska Skúla í Klaksvík og Lista- og Ítróttaskúla á Sandoynni.

Samanumtikið kann sigast, at Tjóðveldisflokkurin hevur brynjað seg út til komandi valskeið, og hóast flokkurin í hesi støðu neyvan verður eins sjónligur og áður, hevur formaður floksins Høgni Hoydal stórar ætlanir at reka initiativríkan og virknan andstøðupolitikk.



*Tjóðveldisflokkurin hevði hósmorgunin tíðindafund um framtíðarætlaninar í andstøðu*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**04. mars 2004**
**Framsøgufólk Tjóðveldisflokins:**

| | |
|---|---|
| Politiskt framsøgufólk: | Høgni Hoydal |
| Fullveldismál: | Høgni Hoydal |
| Uttanlands- og trygdarmál: | Hergeir Nielsen |
| Fíggjar - og búskaparmál: | Karsten Hansen og Páll á Reynatúgvu (Býtið er greinað) |
| Almannamál: | Finnur Helmsdal og Annita á Fríðriksmørk (Býtið er greinað) |
| Heilsumál: | Annita á Fríðriksmørk og Finnur Helmsdal (Býtið er greinað) |
| Vinnupolitikkur: | Torbjørn Jacobsen og Heidi Petersen (Býtið er greinað) |
| Fiskivinnumál: | Heidi Petersen |
| Vinnumál: | Torbjørn Jacobsen |
| Undirvísingar og granskingarmál: | Heidi Petersen |
| Mentamál: | Torbjørn Jacobsen |
| Løgmál og rættarmál: | Finnur Helmsdal |
| Eldrapolitikkur: | Páll á Reynatúgvu |
| Umhvørvismál: | Hergeir Nielsen |
| Samferðslumál: | Páll á Reynatúgvu |
| Javnstøðumál: | Annita á Fríðriksmørk |
| Kommunumál: | Karsten Hansen |
| Íbúðarmál: | Finnur Helmsdal |
| Landbúnaðarmál: | Páll á Reynatúgvu |
| Oljumál: | Annita á Fríðriksmørk |
| Arbeiðsmarknaðarmál: | Karsten Hansen |
| Ferðavinnumál: | Páll á Reynatúgvu |
| Kirkjumál: | Annita á Fríðriksmørk |
| Orkumál: | Karsten Hansen |
| Økismenning og útjaðaramál: | Hergeir Nielsen |
| Tingsins virki: | Hergeir Nielsen |
| Norðurlandamál: | Høgni Hoydal |

**Uppskot hjá Tjóðveldisflokkinum á tingi, mars 2004**

Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um útbúgvingarstuðul (barsilsskipan fyri lesandi)

Uppskot til løgtingslóg um barnavernd (Barnaverndarlógin)

Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti

Uppskot til løgtingslóg um yrkisskeið (útbúgving fyri fólk í vinnu)

Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi

Uppskot til løgtingslóg um at byggja lista- og ítróttaskúla við Meginskúlan í Sandoynni

Uppskot til løgtingslóg um at byggja fiskivinnuskúla í Vestmanna

Uppskot til løgtingslóg um at útbyggja Tekniska Skúlan í Klaksvík

Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ítróttarvedding v.m.

Uppskot til løgtingslóg um yrkisskeið

Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um viðgerð av persónsupplýsingum

Uppskot til samtyktar um almennan málpolitikk

Uppskot til samtyktar um miðvís framtøk fyri gransking, tøkni og menning í Føroyum

Uppskot til samtyktar viðvíkjandi vegakervunum Skálafjørður-Strendur og Norðskáli-Oyri

Uppskot til samtyktar um framtøk fyri føroyskar tónleikarar

Uppskot til samtyktar um at velja umboð Løgtingsins til Norðurlandaráðið